



# Nú er skráin klár

So var skráin fyri Summar Festivalin 2009 kunngjørd. Hóskvøld fer Vágsbøur at kóka við Nik & Jay. Fríggjakvøld verður konsert við tí mestseljandi tónleikaranum, sum nakrantíð hevur spælt í Føroyum - Robin Gibb. Og leygarkvøldið rakar ABBA-farsóttin Føroyar við einum stórslignum ABBA-showi.

Far inn á www. summarfestivalur.fo og síggj alla skránna, les um bólkarnar og hygg eftir myndum, so tú kemur í rætta festivalhýrin! ;)

# Fáið armbond uppá í góðari tíð



**Skalt tú sleppa undan at standa í kø við inngongdina til Summar Festivalin, so ræður um at fáa sær armband upp á armin áðrenn festivalin**

FESTIVALLÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

Atgongumerkini til Summar Festivalin skulu skiftast um við armbond, áðrenn tað ber til at sleppa inn á festivaløkið. Vanda er fyri, at tað verður nakað av kø við inngongdina til Summar Festivalin hjá teimum, sum skulu hava armband uppá.

Men tú kanst tryggja tær skjótari atgongd til festivaløkið við at koyra armbandið uppá áðrenn festivalurin byrjar.

Fram til og við mikudagin ber til at fáa armbond uppá á deildunum hjá Norðoya Sparikassa í Klaksvík, Runavík og í Havn.

Tað ber eisini til at fáa armbond uppá í Telebúðini í Klaksvík og í klædnahandlinum JAP í Klaksvík.

Og tá festivalurin byrjar, ber eisini til at fáa armbond við høvuðsinngongdirnar til festivalin.

# Gyklaundirhald á Summarfestivalinum

**Summarfestivalurin hevur altíð havt barna- og familjuundirhald frammaliga í huganum, og aftur í ár verður nógv gjørt burturúr hesum**

FESTIVALLÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

Millum tey, sum fara at undirhalda, er ein stuttlig samanrenning av føroyskum og donskum gyklaundirhaldi. Summarfestivalurin hevur nevniliga sett føroyska gyklaran Ásbjørn Berthelsen saman við danska Steen Pegani.

Steen Pegani er ein sera kendur og nógv avhildin undirhaldari í Danmark. Hann undirheldur bæði fyri børnum og vaksnum, og hevur fleiri enn 100 sýningar um árið. Hann undirheldur millum annað í fleiri Sirkus sýningum.

Ásbjørn Berthelsen er væl kendur her í Føroyum. Hann hevur undirhildið í nogv ár, og hann hevur eitt nú verið at sæð á sjónvarpsskíggjanum fyri nøkrum árum síðani. Hann undirheldur við gykli og búktaling.

Á Summarfestivalinum fara teir báðir at hava fleiri gyklasýningar umframt at teir eisini fara at vera á festivaløkinum við undirhaldi av ymiskum slagi, og so koma teir eisini at hava eitt ella fleiri innsløg til barnakonsertirnar í Silvalandi, sum verða fríggjakvøldið og leygarkvøldið.



*Pegani og Ásbjørn gykla og hava tað stuttligt við børnunum á Summar Festivalinum*





## Túnatos

**Ragnhild hittir í dag Óla Jacobsen, sum er 19 ára gamal frá Klaksvík. Óli arbeiðir sum kavari og gleðir seg sum eitt smábarn til Summar Festivalin.**

**Ætlar tú tær á SF í ár?**
*Ja, absolutt! Havi fingið atgongumerki frá mammu og babba, men SF er annars eitt must hvørt ár – um mann er heima, altso.*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Tað var Dynamit í fjør – heilt klárt tann besta konsertin nakrantíð! Eg hevði annars glett meg ræðuliga nógv til Melanie C, men minnist bara einki frá tí konsertini.*

**3. Svevur tú í tjald ella í ordiligari song, tá tú ert á SF?**
*Eg sovi heima í míni egnu song.*

**4. Hevur tú nakrantíð skora á SF?**
*Eg fjasaðist við einari fittari diddu í fjør – og í dag er hon daman hjá mær.*

**5. Hvat er tað løgnasta, tú hevur upplivað á SF?**
*At eg kláraði at skora damuna hjá mær!*